## Barca og Gunners á beinari kós

Tær báðar fyrru hálvfinalurnar í UEFA Champions-League vórðu spældar ávíkavist týs- og mikukvøldið.

Týskvøldið vitjaði Barcelona á San Siro í Milano, og her eydnaðist gestunum at fara avstað við einum 1-0 sigri. Málið fingu teir tíðliga í seinna hálvleiki, tá Giuly hamraði eina sending frá Ronaldinho í kassan. Men tað er einki at taka seg aftur í, at tey í Milan mundu iðra seg. Fram til málið sat heimaliðið á øllum, og serliga Gilardino mundi iðra seg um misnýttar møguleikar.

Í gjárkvøldi hevði Arsenal heimavøll móti spanska Villareal, og her eydnaðist ensku kanónunum at tryggja sær eitt gott útgangsstøði við einum 1-0 sigri. Málið hjá Arsenal skeyt Kolo Touré stutt undan steðginum.

Seinnu hálvfinalurnar verða spælari í komandi viku.

**-mørk**

## Ballack til Chelsea

Sambært týskum miðlum komu týski landsliðsskiparin, Michael Ballack, og enska stórfelagið Chelsea í gjár ásamt um ein fýra ára sáttmála.

Ballack hevur leingi verið eitt mál hjá Chelsea, og nú sáttmálin hjá honum við Bayern Munchen gongur út í summar, kann enska meistaraliðið fáa týska miðvallaran uttan at gjalda samsýning til týsku meistararnar.

Hinvegin meta bæði týskir og enskir miðlar, at sáttmálin við Ballack kostar Chelsea umleið 300 milliónir krónur fyri tey fýra árini.

**-tn**



*Ársins stjørnuskot: Louisa Andreasen úr Stjørnuni og Regin Joensen úr VÍF*



*Tað gjørdist heilt nostalgiskt, tá tríggjar »gamlar« hondbóltskempur fóru upp á pallin, tá ársins venjari skuldi finnast*



*Sterkasta verjan í landinum kemur úr Kyndli. Marius Joensen, Jórun S. Ludvig og Hans Áki Dal-Christiansen vórðu øll rópt á pallin*



*Har var eingin ivi, tá atkvøðast skuldi um ársins málverja hjá kvinnum. Eitt heiti, sum Manuela Stan Jensen vann í stórum stíli*



*Ársins dómarar gjørdust annað árið á rað Eyðun Samuelsen og Andreas F. Hansen*

## Tey bestu

**Toppskjúttar**
**Kvinnur**
Daiva Toumaite, VB

**Menn**
Blagoje Buha, Neistin
Høgni Klein, Kyndil

**Besti málverji**
**Kvinnur**
Manuela Stan Jensen, Neistin

**Menn**
Marian Cirloganescu, Stíf

**Besti áleypari**
**Kvinnur**
Daiva Toumaite, VB

**Menn**
Høgni Klein, Kyndil

**Besti verjuspælari**
**Kvinnur**
Jórun Ludvig, Kyndil

**Menn**
Marius Joensen, Kyndil
Hans Áki Dal-Christiansen, Kyndil

**Besti venjari**
**Kvinnur**
Ingi Olsen, Neistin

**Menn**
Kári Nielsen, Kyndil
Hannis P. Wardum, Kyndil

**Ársins Stjørnuskot**
**Kvinnur**
Louisa Andreasen, Stjørnan

**Menn**
Regin Joensen, VÍF

**Ársins dómarar**
Eyðun L. Samuelsen & Andreas F. Hansen

**Ársins spælari**
**Kvinnur**
Daiva Toumaite, VB

**Menn**
Høgni Klein, Kyndil




# GITIÐ LEIKARAN



**Kappingarreglur**

Frá mánadegnum 3. apríl og í 15 fylgjandi Sosialum verður andliti á einum kendum føroyskum fótbóltsspælara at síggja. Myndin er tó viðgjørd nakað, soleiðis at tað verður truplari at vita, hvør spælarin er.

Á síðu 31 í fótbóltsblaðnum, sum var partur av VikuskiftisSosialinum, eru 15 tómar reglur. Á hesar skulu nøvnini á teimum 15 spælarunum setast.

Tá hetta er gjørt, skal blaðsíðan við nøvnunum sendast okkum. Seinasta freist fyri innlatan er mánadagin 1. mai. Navnið á vinnaranum verður kunngjørt í Sosialinum tann 4. mai.

Minnist til at skriva navn, bústað og telefonnummar á seðilin, sum verður sendir okkum.

Verður avrit av síðuni sent okkum, verður hetta ikki roknað sum gyldugt luttøkuprógv.

Vinnið fótbóltsupplivingina Skotland - Føroyar

ATLANTIC AIRWAYS